# Kunngerð

## um broyting av ALS-gjaldinum

Við heimild í § 9, stk. 3 í løgtingslóg nr. 113 frá 13. juni 1997 um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing, við seinni broytingum, hevur stýrið fyri Arbeiðsloysiskipanina fyrisett:

§ 1. Tað í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing, § 9, stk. 1, nevnda ALS-gjald er 0,75 %.

§ 2. Henda kunngerð fær gildi frá 1. september 2003. Samstundis fer úr gildi kunngerð um broyting av ALS-gjaldinum, dagfest 13. november 2002.

Stýrið fyri Arbeiðsloysisskipanina, 2. juli 2003

Karin Kjølbro (sign.) formaður

Elisabeh O. Gaardbo (sign.)

*ALS hevur til endamáls at veita fíggjarligan stuðul til arbeiðsleys, at virka fyri bøttum møguleikum hjá arbeiðsleysum at fáa arbeiði og at umsita arbeiðsávísing fyri føroyska arbeiðsmarknaðin. Á ALS starvast í løtuni 18 fólk. Virksemið hjá ALS er í høvuðsheitum lógarásett. Ovastu leiðsluna hevur stýrið fyri ALS, sum - eftir tilmæli frá arbeiðsgevara- og løntakarafeløgunum á arbeiðsmarknaðinum - verður valt av Føroya Landsstýri.*

ALS

Arbeiðsloysisskipanin • Postsmoga 3022 • FO-110 Tórshavn
Tel 349550 • Fax 349551 • als@als.fo • www.als.fo



# Føroya Koyriskúli

**Jekaragøta 10 · 100 Tórshavn**

Nýtt teoriskeið til persónbil byrjar 30. juli 2003 kl. 17.30

Motorsúkklukoyrikort byrjar kl. 19.30

Sosialurin 341800

**Tekning:** Stanley Olsen tel 21 10 99
John Christiansen tel 21 47 75
t-post: stanley@post.olivant.fo

# Lærari

Søkt verður eftir lærara í Hestoy skúlaárið 2003/2004.

Løn sambært sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknir skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi 1. august 2003.

**Skúlastýrið fyri Hest skúla**
v/ Tróndur Lyngvej
280 Hestur

# Rætting

**til starvslýsing eftir avloysara fyri laborant lýst í leygardagsblaðnum 12. juli 2003**

**Tíð og setanarviðurskifti:**
Setanin byrjar 1. september 2003 og endar 31. august 2004. Møguleiki er fyri, at setanin verður longd til 31. august 2005.

**Heilsufrøðiliga starvsstovan**
Falkavegur 6, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. +298 35 64 00
Fax. + 298 35 64 01
E-mail: hfs@hfs.fo
www.hfs.fo

# Sethús í Saltangará til sølu



Húsini eru 1-plans, 190 m² umframt bilhús.

Húsini hava flagtak, bygd í 1997.

Minsta boð 1,8 mió. kr.

**Tlf. 447875,** Marni

# Gravsteinar, kantsteinar og blómubeð

**Nú eisini úr Føroyskum gróti**

Sosialurin - 311820



Skjót levering

Prísir við litmyndum verða sendir kring landið og til útlandið

Danstein
Tel. 447512
Tel. 217512
Tel. 318323
Fax 449961
www.danstein.fo
RUNAVÍK - R. C. EFFERSØESGØTA 19, TÓRSHAVN

# A.H.Jensen

**-alt innan reingerð**

**Handilin er stongdur vegna summarfrí frá mánadegnum 28. juli til mánadagin 11.august**

**Átrokandi boð: fartel: 21 26 76**
**telefax: 31 81 01**

# Summarfrí

Vegna summarfrí er skrivstovan afturlatin frá mánadegi 28. juli til fríggjadagin 8. august.

Í summarfrítíðini ber til at ringja á tel 28 29 19

Opið aftur sum vanligt mánadagin 11. august

**Føroya Lívstrygging**

Kaj Andreasen & Co
Heilsøla • smásøla • umboð
Tel. 31 56 00 • www.andreasen.fo

# Stilladsútgerð og forskallingsútgerð

HÜNNEBECK



**Til keyps og leigu:**

- Fasadustillads
- Rullustillads
- Aluminiumstillads
- Forskallingar - Nógv sløg!
- Forskallingsútgerð: Forskallingsoljur, sproytur, klams, konus, avstandsrør, binditráður, bindimaksinur, fuguband, stoypibats/isolering, armeringsjarn o.a.

Sosialurin 341800

Leverandørurin til byggi-entreprenørvinnuna síðan 1970!





## STARVSFÓLK TIL FLYKRUNA Í SMS

SØKT VERÐUR EFTIR STARVSFÓLKIÐ TIL FLYKRUNA Í SMS AT BYRJA BEINAVEGIN.

STARVIÐ ER HÁLVTÍÐARSTARV VIÐ SKIFTANDI VAKTUM. FLYKRAN SELUR UNDIRKLÆÐIR OG KVINNUKLÆÐIR.

**UMSÓKNIR SKULU SENDAST TIL:**
FLYKRUNA
POSTBOKS 1047
110 TÓRSHAVN

MØGULIGIR SPURNINGAR UM STARVIÐ FÁAST Á TEL. 31 55 65 ELLA VIÐ AT STØKKA INN Á GÓLVIÐ Í HANDLINUM.

*Flykran*
SMS 31 55 65

Landsfelag Pensjónistanna

# Ferðatilboð

Landsfelagið boðar frá, at Pensjónistafelagið H.Ø.F.T. ger útferð til Noregs tann 25. august.

Av frámelding vegna sjúku eru 4 pláss leys.

Fólk, ið hava áhuga, biðjast um at ringja til Thorbjørn Lisberg, formann, telefon 371150.

**Landsfelag Pensjónistanna**

# Eldri hús í Tórshavn til sølu

Um hóskandi boð fæst verða húsini í Eiriksgøtu 17 seld.
Húsini eru í trimum hæddum, uml. 48 m² hvør, og eru tvær hæddir innrættaðar.
Stovuhædd: 2 kømur, stova, køkur og baðiverilsi.
Loftshædd: 2 kømur, stova, køkur og wc.
Kjallarin er ikki innrættaður.

Áhugað kunnu ringja tlf. 228495

Sosialurin
www.sosialurin.fo

**Landssjúkrahúsið**
FO 100 Tórshavn

# Sjúkrarøktarfrøðingur til sjúklingaskrivstovuna

Hálvtíðarstarv á sjúklingaskrivstovuni er leyst at søkja til setan skjótast gjørligt.

**Høvuðsuppgávur:**
- Samskifti við sjúklingar og avvarandi
- Samstarv við deildir á Landssjúkrahúsinum og Sjúklingahotellið
- Umsiting í smb. við sjúklingar, sum skulu uttanlands
- Skráseting av innleggingarseðlum
- Innkalling av sjúklingum

**Krøv til umsøkjaran:**
- útbúgving og hollar arbeiðsroyndir sum sjúkrarøktarfrøðingur
- evni til at raðfesta og planleggja arbeiðið
- hollur edv-førleiki
- kunna arbeiða sjálvstøðugt
- førleiki í føroyskum, donskum og enskum, bæði skrivliga og munnliga
- góð samstarvsevni og tænastuhug
- góður røkjuskapur
- fleksibilitetur

**Vit kunnu bjóða:**
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- góða innleiðslu (introduktión)
- eitt avbjóðandi starv

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Marin Vang, sjúkrarøktarstjóra, tlf. 31 35 40, lokal 266 - teldupostur marinv@lsh.fo

Umsóknarfreistin er 4. august 2003 kl. 12.00.

Skrivligar umsóknir við avriti av prógvum og viðmælum e.l. skulu sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Starvsfólkadeildin
100 Tórshavn

Isaksen's Bussar
✆ 44 16 87 - 21 16 87 - 22 16 87



Booking:
Tel. +298 44 16 87
Fax. +298 44 18 87
E-mail: kiki@post.olivant.fo

* FO-660 Søldarfjørður, The Faroe Islands *

Sosialurin 341800

Busskoyring – til eitthvørt endamál
Bussar í ymiskum støddum,
frá 10 pers upp til 52 pers.
5 ymiskar støddir + handikaplift.
Vit koyra innan- og uttanlands.
Turist - fótbólt - bindiklubbar - útferðir - leigutúrar
Ring og fá eitt tilboð og hoyr nærri.

**OLJUMÁLARÁÐIÐ**

# Avloysari fyri løgfrøðing

Við hesum verður eitt fyribilsstarv sum avloysari fyri løgfrøðing í umhvørvisdeildini lýst leyst at søkja.

**Starvsinnihald**
Høvuðsuppgávan er at ráðgeva í sambandi við lógarsmíð, kæruviðgerð, al- og millumtjóða samstarv og aðrari málsviðgerð hjá umhvørvisdeildini.

Umhvørvisdeildin umsitir umhvørvismál, náttúrumál, skógrøktarmál, býarskipanarmál, orkumál og útjaðaramál. Arbeiðsuppgávurnar eru fjølháttaðar, og møguleikarnir fyri persónligari og fakligari menning eru góðir.

**Førleikakrøv**
Vit vænta at umsøkjarar hava útbúgving sum løgfrøðingur, umframt góðan kunnleika til føroyskt og enskt mál.

Tað hevur týdning, at umsøkjarar duga at arbeiða sjálvstøðugt og eru til reiðar at royna nýggjar avbjóðingar.

**Setanarskeið**
Starvið verður sett skjótast gjørligt. Setanin er í fyrstu atløgu í hálvt ár, men kann møguliga leingjast.

**Setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum, CV o.ø. verður at senda:

Oljumálaráðið
Postsmoga 3059
110 Tórshavn

Umsóknir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 1. august 2003. Umsøkjarar, ið ynskja fleiri upplýsingar um starvið, eru vælkomnir at seta seg í samband við Oljumálaráðið á tlf. 35 70 70 og tosa við Rók Tummasarson, deildarleiðara.

# Summarfrí

Kommunuskrivstovan verður stongd frá mánadegi 28. juli til mánadagin 18. august.

**Vestmanna Kommuna**

# Summarfrí

Vit eru í summarfrí frá 21. juli til 25. august.

**Havnar Arbeiðskvinnufelag**